## Rannvá noyddist útaftur

Rannvá Andreassen byrjaði dystin ímóti Isle of Man á beinkinum. Hon var ein av spælarunum, sum landsliðsvenjarin vildi spara til dystin ímóti Álandi mánadagin.

Men tað mundi endað galið, tá ið Rannvá kom á vøllin eftir ein tíma. Eftir at hon hevði spælt á vinstra miðvølli í eitt korter, trakaði hon skeivt í einum nærdysti og noyddist út at fáa viðgerð. Fóturin varð køldur av við ísi fyri at minka um avleiðingarnar av snuddinum, og Rannvá kom ikki á vøllin aftur.

Roknað varð við, at Rannvá var klár at spæla dystin ímóti Álandi seinnapartin mánadagin.

**ek**



*Jacob Thomsen, hjálparvenjari hjá føroyska kvinnulandsliðnum í fótbólti*

## Jacob nýggjur hjálpari

Jón Harald Poulsen hevur røkt uppgávuna sum hjálparvenjari á undanfarnu Oyggjaleikunum, men hann bar seg undan hesaferð, tí hann hevur nógv at taka sær av í sambandi við Europa Cup luttøkuna hjá KÍ-kvinnum í august.

Avloysarin er sumbingurin Jacob Thomsen, sum býr í Havn og er royndur venjari í B36. Hann hevur vant alt frá ungdómsliðum til 1. deild, og seinastu tvey árini hevur hann verið venjari hjá besta kvinnuliðnum hjá B36.

Jacob og kvinnurnar hjá B36 vunnu fyri góðari viku síðani steypafinaluna.

**ek**



*Mary-Ann Isaksen í nærdysti við ein av spælarunum hjá Isle of Man. Føroyska liðið sat fullkomiliga á dystinum, og í seinna hálvleiki skolaðu málini eisini inn*

# Kvinnurnar flongdu Man

**Venjarin spardi nakrar lyklaspælarar, men føroysku kvinnurnar vunnu sannførandi á Isle of Man. Ferð kom á málskjótingina í seinna hálvleiki, og sigurin var ikki eitt mál ov stórur. Føroyska áskoðarafjøldin var so stór, sum hon sjáldan er til kvinnudystir í Føroyum**

FÓTBÓLTUR

*Eyðun/Jens Kr.*
*eydun@sosialurin.fo*

**Burra:** Føroyska kvinnulandsliðið byrjaði dystin ímóti Isle of Man nakað trivlandi, men tær høvdu allatíðina tamarhald á støðuni, og í seinna hálvleiki gjørdu tær málini, sum vóru nóg mikið til at kalla sigurin ein stórsigur.

6-0, og so var fyrsta uppgávan á Oyggjaleikunum loyst til fulnar.

Landsliðvenjarin Álvur Hansen spardi nakrar av sínum lyklaspælarum, og tí fingu aðrir spælarar kjansin at vísa seg.

Rannvá Andreassen, Ása Dam á Neystabø, Randi Wardum og Vivian Bjartalíð byrjaðu uttanfyri, men hinvegin sluppu spælarar sum Asta Magnussen, Jacoba Langgaard, Mary-Ann Isaksen og Laila Jespersen at royna seg frá byrjan.

Føroyar høvdu stóra yvirvág í spæli allatíðina. Tað gekk nakað striltið at fáa mál í fyrra hálvleiki, men í seinna hálvleiki skoraðu kvinnurnar fimm góð mál.

### Trý mál við frísparki

Malena Josepsen skoraði einasta málið í fyrra hálvleiki, og hon skoraði eitt afturat í seinna hálvleiki. Álopsmakkarin Halltóra Joensen fekk eisini tvey mál, og hinu bæði málini skoraðu innskifta Ása Dam á Neystabø og debutanturin Jacoba Langgaard.

Trý av málunum í seinna hálvleiki komu eftir beinleiðis fríspark. Fyrst sparkaði Jacoba beinleiðis upp í málhornið, og síðani gjørdi Halltóra Joensen henni kynstrið eftir – tvær ferðir.

Málið hjá Ásu kom eftir at Halltóra gjørdist leys og prikaði fram um málmannin, har Ása var fyrst á bóltinum og sparkaði í tóma málið. Malena skoraði eisini eftir ein bólt fram um verjuna hjá Isle of Man.

### Lítið vongspæl

Føroyska spælið var til tíðir gott, men tað vóru eisini løtur, har tað ikki rættiliga hekk saman. Vøllurin var sera smalur, og tað hevði við sær, at vongspælið sjáldan riggaði. Tað hjálpti heldur ikki, at uttastu miðvallararnir høvdu hug at leita inn á vøllin, men eftir at Ása Dam á Neystabø og Rannvá Augustinussen vóru komnar inn gekk betur við at spæla í dýpdina í síðunum.

Á sentrala miðvøllinum høvdu Rannvá Augustinussen og Jacoba Langgaard gott tak á, hóast dómarin var í so strangur at døma fríspark í nærdystunum.

Verjan hevði ikki tað stóra at gera, men nakrir langir bólt skaptu smærri trupulleikar, og í einu støðuni noyddist Laila Jespersen at bjarga.

Samanumtikið ein tryggur sigur, har føroyska liðið í løtum kundi taka tað róligt uttan at kenna seg hótt.

Og rundan um vøllin vóru nógvir føroyingar at síggja. Ja, føroyska áskoðarafjøldin var so stór, sum hon sjáldan er til kvinnudystir í Føroyum, og lagið var óført.

## FAKTA

**Oyggjaleikir, 1. umfar, 20. juli 2005**
**Føroyar-Isle of Man 6-0 (1-0)**
1-0: Malena Josephsen, 21.
2-0: Jacoba Langgaard, 50
3-0: Ása Dam á Neystabø,
4-0: Malena Josephsen
5-0: Halltóra Joensen
6-0: Halltóra Joensen
**Føroyar:** Laila Jespersen – Asta Magnussen, Bára Skaale Klakstein, Unn Kragesteen, Ann Olsen – Sólva Joensen (Ása Dam á Neystabø, 64.), Jacoba Langgaard, Rannvá Augustinussen, Mary-Ann Isaksen (Rannvá Andreasen, 60/Rakul Magnussen, 75.) – Halltóra Joensen, Malena Josephsen
**Venjari:** Álvur Hansen